54 minuttir við Blair

Jóannes Eidesgaard slapp ikki at hitta bretska forsætisráðharran, sum hann hevði vónað, men John Prescott, varaforsætisráðharra, fekk hann hinvegin eitt prát við

Jóannes Eidesgaard var mikudagin saman við 20.000 øðrum á landsfundi hjá bretska arbeiðaraflokkinum, har hann millum annað fekk høvi at hoyra Tony Blair halda røðu.

MAGNUS DAM

Tá ið Jóannes Eidesgaard hóskvøldið helt røðu í Fólkatinginum, tók hann ikki eins og øll onnur støði í røðuni hjá forsætisráðharranum, Poul Nyrup Rasmussen, um týsdagin hevði hildið seinastu setanarrøðuna í hesum valskeiðnum.

Jóannes Eidesgaard hoyrdi ikki røðuna hjá Nyrup týsdagin, tí tá lurtaði hann eftir einari aðrari røðu, sum ein annar forsætisráðharri helt. Hetta var í Brighton í Suðuronglandi, har Labour, bretski arbeiðaraflokkurin, helt sín árliga landsfund. Á røðarapallinum stóð bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, og helt røðu fyri teimum mongu túsund Labour-veljarunum, sum vóru komnir at hoyra oddamannin í Labour halda røðu.

Jóannes Eidesgaard var boðin til landsfundin hjá Labour, eftir at hann í fjør vitjaði á høvuðsskrivstovuni hjá flokkinum í London. Hann heldur tað vera sunt fyri Javnaðarflokkin at hava samband við aðrar flokkar enn bert teir norðurlendsku, sum gott samband altið hevur verið við.

Annar heimur

At koma til landsfundin hjá Labour var sum at stíga inn í ein annan heim. Viðurskiftini eru so nógv størri og øðrvísi, enn tá Javnaðarflokkurin heldur landsfund í Føroyum, at hetta als ikki kann samanberast.

Ikki færri enn 20.000 fólk luttóku á landsfundinum, sum er ein samantvinning millum ein politiskan fund og eina sølustevnu. Privatar fyritøkur fíggja stóran part av tí, tað kostar at halda landsfundin, og afturfyri sleppa fyritøkurnar at vísa fram sínar vørur og tænastur. Har vóru teldur, heilivágur, bøkur og annað, og so tað politiska virksemið við smærri verkstøðum, spyrjitímum, har ráðharrar svara spurningum og ikki minst tann stóra høllin, har allir oddamenninir í Labour-flokkinum halda sínar røður.

Tað var í hesi høllini, at hæddarpunktið á túrinum skuldi finnast. Seinnapartin týsdagin sótu tey mongu fólkini spent og bíðaðu eftir, at Tony Blair skuldi koma á pallin. Bretski leiðarin, sum fyrr í ár vann stjórnarvaldið í enn eitt skeið, er væl umtóktur í sínum egna flokki, og hetta merktist týðuliga inni í salinum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Bersøgin Blair

At síggja og hoyra Tony Blair standa á pallinum og halda eina røðu, sum vardi í 54 minuttir, var eitt stórt upplivilsi, og ikki minst inspirerandi.

– Hann helt eina sera góða, bersøgna og altjóðakenda røðu, sum fyri tað mesta snúði seg um yvirgangsatsóknirnar í New York og Washington og stríðið, sum Bretland og USA nú standa á odda fyri ímóti yvirganginum. Men hann nam eisini við innlendis viðurskifti, vælferðarskipanina

– Tað var greitt, at hann segði tað, sum fólki vildi hava hann at siga, og tú merkti av álvara, at fólk taka undir við hansara boðskapi, sigur Jóannes Eidesgaard, sum ikki kundi bæra sær við at endurgeva nakað av tí, sum Tony Blair segði, tá hann sjálvur helt røðu í Fólkatinginum hóskvøldið.

– Tað er greitt, at tú blívur inspireraður av einari sovorðnari røðu, sigur Jóannes Eidesgaard, sum eisini nýtti stóran part av sínari talutíð í Fólkatinginum til at tosa um yvirgangin tann 11. september.

Hitti varaforsætisráðharran

Teir 54 minuttirnar, tað tók Tony Blair at halda sína røðu, vóru eisini teir einastu, sum fundarluttakararnir sóu nakað til forsætisráðharran. Hann hevur úr at gera við júst spurninginum um yvirgangin, og tí var hann skjótur avstað aftur.

Jóannes Eidesgaard hevur ongantíð hitt Tony Blair og hevði sjálvsagt vónað, at hetta skuldi gerast tann løtan. Tað gjørdi tað so ikki, men í staðin hitti formaðurin í Javnaðarflokkinum nummar tvey í bretsku stjórnini, John Prescott, varaforsætisráðharra.

Hetta var á einari samkomu eftir røðuna hjá Blair, og Prescott var rættiliga ovfarin av, at formaðurin í føroyska Javnaðarflokkinum var komin ta langu leið úr Føroyum til Brighton til landsfundin hjá Labour. John Prescott vísti seg at kenna ein heilan hóp til Føroya, og teir báðir fingu eitt lítið prát. Varaforsætisráðharrin er úr Hull, sum hevur havt nógv samband við Føroyar gjøgnum tíðina.

Um Jóannes Eidesgaard takkaði fyri innbjóðingina við at bjóða Tony Blair ella John Prescott til næsta landsfundin hjá Javnaðarflokkinum í Føroyum, sigur søgan tó einki um.

Seinasta nýggja: Tað var ikki ætlanin at raka bløðini

Postgjøldini fyri at bera bløð út, hækka ikki. Tað er úrslitið av einum fundi á miðdegi í gjár ímillum landsstýrismannin í vinnumálum og leiðsluna á Dimmalætting og Sosialinum

BLAÐÚTBERING
Áki Bertholdsen

Ætlanin, at hækka postgjøldini fyri at bera føroysku bløðini út, sum greitt er frá í øðrum greinum í blaðnum í dag, verður ikki sett í verk.

Tað er úrslitið av einum fundi á miðdegi í gjár ímillum Bjarna Djurholm, landsstýrismann í vinnumálum og leiðsluna á Dimmalætting og á Sosialinum.

Blaðleiðslurnar høvdu biðið Bjarna Djurholm um kreppufund, eftir at tað kom fram, at ætlanin var at hækka postgjøldini fyri bløðini næstan 50% og tann fundurin var á miðdegi í gjár.

– Bjarni Djurholm segði, at tað kom óvart á seg, at hækkingin fekk so stórar avleiðingar fyri bløðini, tí tað var ikki ætlanin at raka tey.

Tí verður hækkingin upp á 50 oyru, sum skuldi setast í gildi 15. oktober strikað.

Harafturat skuldi landsstýrismaðurin viðgera hækkingina uppá hini 50 oyruni, sum skuldi koma í gildi 1. januar einaferð afturat.

– Hann væntaði tó, at hon eisini verður strikað og at Postverkið fær endurgjald fyri mistu inntøkuna aðrastaðni frá.

Annars varð avtalað, at støðan hjá bløðunum skal takast upp í øðrum høpi eisini.

Bløðini hava í trýr ár roynt at fáa samskiftið ílag við Landsstýrið um at fáa stuðul til blaðútbering, eins og flestu grannalond okkara gera.

Men í landsstýrinum er ikki semja um, antin talan er um vinnumál ella mentamál og tí er onki komið burturúr.

Tí er tað nú avgjørt at fáa Løgmann upp í málið fyri at fáa greiði á, hvar málið hoyrir heima. Í næstum verður tí eisini fundur við Løgmann um støðuna hjá bløðunum.

Estlendsk tiltøk í Norðurlandahúsinum

TÍÐINDASKRIV

Estlendska fotoframsýningin "Ancient Trees of Estonia" hjá Hendrik Relve letur upp í Norðurlandahúsinum í dag klokkan 14.00.

Nógv gomul og heilag trø við teirra egnu sagnum hava yvirlivað til dagin í dag. "Ancient Trees" verkætlanin varð gjørd í Estlandi frá 1996 – 1999. Saman við bíløtunum er eisini tekstur, sum sigur frá, hvar træið stendur, mátini á trænum og tess søgu.

Klokkan 16.00 í dag verður konsert við duoini Raivotafenau og Meelis Vind, sum spæla bariton saxifon og basso-tone clarinet. Raivotafenau og Meelis Vind eru eisini úr Estlandi, og hava teir spælt saman síðani 1996. Teir fara at spæla egin løg umframt útleggingar av tónleiki hjá øðrum.

Tiltøkini eru bæði ein partur av "The Baltic Cultural Festival in the Nordic Countries 2001". Festivalurin er eisini í Íslandi, Noregi, Danmark, Svoríki, Finlandi, Grønlandi og Álandi í tíðarskeiðnum 01.09 – 01.11.2001.

Fotoframsýningin verður at síggja í Norðurlandahúsinum fram til fyrst í november, meðan Raivotafenau og Meelis Vind verða bert at hoyra í dag.

Økt vaktarhald á Føroya Tele

Føroya Tele fer í næstum at gera eina vaktarskipan, so at fólk eru á vakt alt samdøgrið, um trupulleikar stinga seg upp

Mikukvøldið var tað ógvuliga torført hjá fólki at fáa samband á internetinum. Orsøkin var, at Føroya Tele hevði arbeitt við at umleggingum á telefonnetinum, men trupulleikar vístu seg eftir hesa umleggingina. Nú skal altíð ein vera á vakt, tá trupulleikar stinga seg upp

FØROYA TELE
Stefan í Skorini

Føroya Tele fer í næstum at hava fólk á vakt alt samdøgrið. Tey skulu vera tilreiðar at fara til arbeiðis, um trupulleikar av ymsum slag stinga seg upp.

Mikukvøldið vóru trupulleikar við internetinum hjá Føroya Tele. Fleiri fólk hava gramt seg um henda trupulleika, tí alt kvøldið bar ikki til at fáa samband. Ikki fyrr enn út á náttina fór tað at rigga aftur.

Tá fólk ringdu til Tænastumiðstøðina at kæra sína neyð, fingu tey at vita, at eingin var til arbeiðis á internetdeildini hetta kvøldið. Tí var eingin at loysa trupulleikarnar.

Hetta skal ikki koma fyri aftur. Tí arbeiðir Føroya Tele við at gera eina vaktarskipan, har eitt starvsfólk er tøkt allar tíðir á samdøgrinum. Í fyrsta umfari verður náttarvaktin bara á standby, so at hon er klár at koma til arbeiðis, um nakað stingur seg upp.

Hetta sigur Hjalgrím Hentze, sum er tekniskur stjóri á Føroya Tele.

Annars sigur hann, at eini seks fólk vóru til arbeiðis mikukvøldið, og tey royndu at fáa bilbukt við teimum teknisku trupulleikunum við internetinum. Hann sigur, at trupulleikarnir mangan eru óguliga torførir at finna, og tí kann tað gerast drúgt at fáa hetta í rættlag.

Nú skulu vaktirnar skipast soleiðis, at onkur altíð er klárur at fara til arbeiðis at greiða teir teknisku trupulleikarnar, sum fólk boða Føroya Tele frá allar tíðir á samdøgrinum.

Vinnarin funnin

Lutakast hevur verið millum teirra, sum hava latið Fiskirannsóknarstovuni toskamerkir seinasta árið. Vinnarin var Karl Isaksen úr Kvívík, og hann fær 10.000 krónur í vinningi.

Seinasta árið hava fiskimenn kunnað latið toskamerkir inn til Fiskirannsóknarstovuna, sum merkir tosk í sínum kanningum og fegin vil hava merkini aftur. Við at skipa fyri lutakasti fáast fleiri merkir innaftur.

Breyt beinið á fjalli

ÓHAPP
Stefan í Skorini

Hósmorgunin klokkan hálvgum tíggju fór bjargingartyrlan eftir einum manni, sum var komin til skaða, tá teir vóru á fjalli á Mjóvanesi í Eysturoynni. Tyrlan var skjót á flogi við tveimum bjargingarmonnum og legði inn á Havnina eftir lækna frá sjúkrahúsinum.

Tyrlan setti bjargingarmenn og lækna av í eini líð, og teir løgdu mannin á børu og fingu hann umborð aftur. Hann hevði brotið beinið.

Tyrlan lendi aftur á tyrlupallinum við Landssjúkrahúsið klokkan 10.03.

Pedagogar afturúrsigldir

Føroya Pedagogfelag góðtekur ikki, at teirra starvsbólkur verður verri fyri lønarliga enn aðrir starvsbólkar

SAMRÁÐINGAR
Turið Kjølbro

Lønarbatin, Fíggjarmálastýrið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, bjóðar limunum hjá Føroya Pedalment, at tað skal verða liviligari í Føroyum og at løn eigur at verða latin, sum er í samsvari við longd av útbúgving. Hetta eigur eisini at verða galdandi fyri okkum, men tilboðið vit hava fingið, er minni enn hetta. Okkara limir eru eftirbátur lønarliga, tað hava vit verið í nógv ár og vit leggja stóran dent á at rætta henda skeivleika í hesum samráðingunum, sigur Carita Björklund, forkvinna í Føroya summarfrítíðina og tveir fundir aftaná. Nú eru partarnir samdir um, at samráðingarnar ikki koma longri. Um eina viku skulu partarnir hittast aftur, eitt nú fyri at gera av, hvørji semingsfólk skulu upp í leikin.